# Tey bestu

**Fyri fyrstu ferð skipaði svimjingin fyri sínum egna gallakvøldi. Hetta varð hildið á Hotel Føroyum, og her varð avdúkað, hvørjir svimjarar høvdu verið tey bestu á árinum. Tað vóru svimjivenjararnir kring landið, sum høvdu greitt atkvøðu hesum viðvíkjandi, og niðanfyri sæst, hvørjir vinnararnir vóru í ymsu bólkunum**

**Ársins Grand-Prix vinnari:**

| | |
|---|---|
| Bólkur 1-3, menn | Pauli Ø. Mohr, FS |
| Bólkur 1-3 kvinnur | Elspa Mørkøre, Skeggjar |
| Bólkur 4, menn | Andreass Thomsen, FS |
| Bólkur 4, kvinnur | Lisbeth L. Joensen, HS |

**Skjótasti svimjari:**
Andrass Thomsen úr HS, 200 m frí

**Besti firvaldsvimjari:**

| | |
|---|---|
| Menn | Janus T. Olsen, HS |
| Kvinnur | Shaila millum Garðarnar, TS |

**Besti ryggsvimjari:**

| | |
|---|---|
| Menn | Hanus H. Eysturdal, HS |
| Kvinnur | Elspa Mørkøre, Skeggjar |

**Besti bringusvimjari:**

| | |
|---|---|
| Menn | Per S. Hansen, Flot |
| Kvinnur | Karina Petersen, FS |

**Besti frísvimjari:**

| | |
|---|---|
| Menn | Andrass Thomsen, HS |
| Kvinnur | Shaila millum Garðarnar, TS |

**Besti blandaðsvimjari:**

| | |
|---|---|
| Menn | Andrass Thomsen, HS |
| Kvinnur | Elspa Mørkøre, Skeggjar |

**Ársins svimjari:**

| | |
|---|---|
| Menn | Jákup Ø. Mohr, FS |
| Kvinnur | Shaila millum Garðarnar, TS |

**Ársins venjari:**
Regitsa Johannesen, TS

Mynd: Shaila
*Shaila millum Garðarnar vann fimm gullmerki, og tríggjar*

# Shaila og Andrass svumu í gulli

**Shaila millum Garðarnar og Andrass Thomsen fóru avstað við tilsamans 13 gullmerkjum, tá FM í svimjing varð svomið**

SVIMJING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

FM-kappingin í svimjing heur seinastu dagarnar verið hildin í Svimjihøllini í Havn. Leygardagin var kappingin av, og samlaða heiðursmerkjabýtið millum ymsu feløgini gjørdist hetta:

| | Gull | Silvur | Bronsa |
|---|---|---|---|
| Havnar Svimjifelag | 21 | 16 | 15 |
| Tvøroyrar Svimjifelag | 10 | 9 | 11 |
| Fuglafjarðar Svimjifelag | 4 | 4 | 2 |
| Flot | 3 | 1 | 5 |
| Skeggjar | 2 | 5 | 4 |
| Ægir | 0 | 4 | 0 |
| Vágs Svjimjifelag | 0 | 1 | 1 |

Stóri vinnarin á kvinnusíðuni var Shaila millum Garðarnar av Tvøroyari. Fimm ferðir stóð hon ovast á sigursskamlinum, og hartil varð hon tríggjar ferðir rópt upp á pallin, tá gallakvøld varð hildið eftir kappingina. Millum steypini, sum Shaila fekk, mundi tað fyri ársins svimjara viga tyngst. Hini bæði heitini, sum Shaila fekk á kvøldinum vóru besti firvaldsvimjari og besti frísvimjari.

Eisini Andrass Thomsen úr Havn tók rættiliga til sín á kappingini. Ikki færri enn átta ferðirnar stóð hann ovastur á sigurspallinum, og eisini hann fekk trý steyp á gallakvøldinum. Her fekk Andrass heitið sum skjótasti svimjarin í einstakari kapping, og fekk hann hetta fyri svimjingina í 200 metra frí. Hartil fekk hann eisini heitið sum besti frísvimjarin og sum besti blandaðsvimjarin.

Hjá monnunum var tað annars Jákup Øssurson Mohr, sum varð kosin besti svimjarin.

## Til Íslands

Eftir kappingina boðaði landsliðsvenjarin, Petur Heðin á Fløtti frá, hvørjar átta svimjarar hann hevði tikið út til kappingina um íslendska meistaraheitið, har føroyingar eisini taka lut.

Føroysku svimjararnir, sum fara lut í kappingini eru: Sára Ejdesgaard og Shaila millum Garðarnar úr TS, Elspa Mørkøre úr Skeggjum og Lisbeth Lindenskov Joensen úr HS. Jóannes á Fløtti og Andrass Thomsen úr HS, Jákup Øssursson Mohr úr FS og Per Símunarson Hansen úr Flot.

Annars verður næsta føroyska avbjóðingin millumtjóða kappingin við Orkney og Hetland. Tann kappingin verður 2. juni í svimjihøllini í Havn.





*Størsti gullslúkurin í kappingini varð Andrass Thomsen, sum vann ikki færri enn átta kappingar*

*Ársins svimjari á mannfólkasíðuni varð Jákup Øssurson Mohr úr Fuglafirði*



*Shaila millum Garðarnar vann fimm gullmerki, og tríggjar ferðir var hon rópt upp á gallakvøldinum*

*Framhald av síðu 25*

ursmálið.

Í Vági var fótbóltsspælið sunnudagin einki serligt. Hetta var fyrsta royndin á nýggja undirlagnum, sum kortini ikki verður tikið alment í nýtslu fyrrenn nú leygardagin, tá ið VB fer at fáa vitjan av ÍF. Vøllinum bilar einki, men vindurin út eftir vøllinum argaði so mikið, at tað var torført at fáa tak á bóltinum. Tískil var tað nógv aftur og fram, og ofta gjørdu spælararnir tað uppaftur meiri torført fyri seg sjálvar, tá ið teir royndu at senda langar og høgar sendingar í staðin fyri at halda bóltinum niðri á nýggja og óslitna vøllinum.

Úrslitið var 1-1. Upp á allar mátar var talan um gott úrslit fyri HB. Meistaraliðið hevði vindin undan í fyrra umfarinum, tá ið VB stutt undan steðginum legði seg á framum. Uppskriftin í sovornum líkindum plagar at vera at royna nógv við skotum úti frá og at vera klárur at fanga bóltin, um málverjin ikki megnar meiri enn at hálvbjarga. Soleiðis var tað ikki hjá HB hesa ferð. Hóast teir á miðvøllinum hava fínar skjúttar, so sást tað millum lítið og einki til hetta hesaferð.

VB setti hol á, tá ið tað bara restaði ein lítil løta av fyrra umfarinum. Í einstøkum førum hevði talan verið um næstan møguleika, men talan var um fyrsta møguleikan, tá ið Mindaugas sneiddi framvið Poul Næss Joensen og setti bóltin í HB málið. Hann hevði fingið tamarhald á langari sending og slapp undan nýggja landsliðsmanninum og miðverjanum, Vagni Mohr Mortensen, sum fór um koll, tá ið teir báðir kappaðust um bóltin.

HB menninir vóru heilt uppøstir. Teir hildu seg vera vísar í, at Mindaugas hevði givið teirra manni eitt skump, og at tað var orsøkin til, at landsliðsmaðurin var farin um koll. Men dómarin og linjudómarin stóðu við sítt. Tað líkaði ikki Vagni Mohr Mortensen, sum segði sína hjartans meining um hetta og harvið tiltuksaði sær gula kortið.

## Dómarin aftur í miðdeplinum

Útgangsstøan hjá VB tóktist vera góð undan seinna umfarinum. Teir vóru frammanfyri, og nú vóru tað teir, sum høvdu vindin undan. Men VB megnaði ikki at seta HB undir trýst. Heldur vóru tað gestirnir, sum høvdu væl betri hugburð. Miðvøllurin arbeiddi sera væl, vágbingarnir tóktust tungir og ikki so væl upplagdir, og tað lá í luftini, at um eitt mál fór at koma afturat, so fóru tað at verða gestirnir, ið fóru at fáa tað, og so var.

HB fekk brotsspark, tá ið ein tími var farin, og tann dómin vóru vágbingar ikki nøgdir við. Heðin á Lakjuni setti ferð á móti VB brotsteiginum, og vongverjin í høgru hjá VB, Mortan úr Hørg, takladi. Heðin fór um koll, og dómarin bríksladi fyri brotssparki. Vágbingar vóru í øðini, tí teir vildu halda, at teirra maður hevði taklað bóltin og ikki mannin. Dómarin stóð við sítt, og Vagnur Mohr Mortensen fekk uppgávuna at royna at seta bóltin framvið Bjarna Johansen. Tað eydnaðist. Hjá summum verður tað mett sum framúr brotsspark, tá ið bólturin fer umvegis stólpan og í málið, og hjá øðrum verður tað mett sum hálvkiksað og ov tepurt. Hvussu var og ikki so skoraði Vagnur.

Vágbingar royndu at trýsta síðstu løtuna, men teir høvdu hvørki hugflog ella tyngd at fáa málið, sum kundi havt við sær, at teir í útgangsstøðuni kundu havt verið eitt sindur verjukendur í Gundadali. Nú er tað HB, sum hevur fatur í langa endanum, og VB skal vísa seg frá síni bestu síðu, um teir skulu vinna finaluplássið, sum teir ikki hava átt síðani í 1997. VB hevur ikki vunnið steypakappingina síðani í 1974. HB hevur ikki vunnið síðani í 1998. Harvið eiga teir ikki enn nakran lut í Løgmanssteypinum, sum tað hevur verið spælt um síðani í 1999. HB hevur tapt tvær finalur um hetta steypið – í 2000 ímóti GÍ og í 2002 ímóti NSÍ.

## FAKTA UM DYSTIN

**VB-HB 1-1 (1-0)**
Fyrra hálvfinala i kappingini um Løgmanssteypið
1-0: Mindaugas 45.
1-1 Vagnur M. Mortensen br 61
**Dómari:** Dagfinn Olsen
**VB:** Bjarni Johansen – Mortan úr Hørg, Eyðun Jacobsen, Anders Sørensen (Jákup Olsen), Dalius - Palli Augustinussen (Poul N. Poulsen), Jón Pauli Olsen, Milan Kulic, Símun Samuelsen (Birgir Jørgensen) - Dan Djurhuus, Mindaugas
**Gult kort:**
**HB:** Pól Næss Joensen - Hallur Danielsen, Símun Eliasen, Vagnur Mohr Mortensen, Janus M. Joensen - Kári Nielsen, Martin Christensen (Hendrik Rubeksen 46), Rúni Nolsøe, Rógvi Jacobsen - Heine Fernandez, Heðin á Lakjuni
**Gult kort:** Vagnur M. Mortensen 45.



# Úrsltini úr FM-kappingini

**100 m frí, kvinnur**

| Nr. | Navn | Árg. | Felag | Innl. | Finala |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Shaila m. Garðarnar | 84 | TS | 1.02.68 | 1.01.89 | 655 |
| 2 Elspa Mørkøre | 90 | Skeggjar | 1.03.45 | 1.02.97 | 622 |
| 3 Lisbeth L. Joensen | 87 | HS | 1.03.28 | 1.03.02 | 621 |

**50 m firvald menn**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Eivind Eysturoy | 77 | HS | 0.28.87 | 0.27.53 | 630 |
| 2 Janus T. Olsen | 86 | HS | 0.28.44 | 0.28.18 | 587 |
| 3 Beinir E. Danielsen | 88 | Flot | 0.28.62 | 0.28.31 | 579 |

**200 m blandað, kvinnur**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Karina Petersen | 80 | FS | 2.54.45 | 2.37.11 | 562 |
| 2 Elspa Mørkøre | 90 | Skeggjar | 2.53.22 | 2.39.47 | 538 |
| 3 Katrin Sørensen | 82 | TS | 2.47.09 | 2.42.35 | 510 |

**200 metur bringað, menn**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Per S. Hansen | 88 | Flot | 2.38.46 | 2.34.63 | 596 |
| 2 Kristian S. Nielsen | 88 | TS | 2.40.33 | 2.34.82 | 594 |
| 3 Pauli Ø. Mohr | 91 | FS | 2.57.76 | 2.55.41 | 408 |

**800 m frí, kvinnur**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Jutta Thomsen | 90 | TS | 10.23.2 | 10.13.32 | 529 |
| 2 Anna K. Eysturberg | 90 | TS | 10.36.6 | 10.28.67 | 491 |
| 3 Mona Simonsen | 91 | TS | 11.09.2 | 10.54.59 | 435 |

**1500 frí, menn**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Andrass Thomsen | 82 | HS | 17.00.0 | 16.47.83 | 669 |
| 2 Jákup Ø. Mohr | 89 | FS | 17.54.0 | 17.31.75 | 589 |
| 3 Remi Langgaard | 91 | Flot | 21.47.2 | 20.27.25 | 370 |

**50 m firvald, kvinnur**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Shaila m. Garðarnar | 84 | TS | 0.31.28 | 0.30.36 | 602 |
| 2 Natalia Reinhardt | 89 | Ægir | 0.33.47 | 0.31.74 | 527 |
| 3 Lisbeth L. Joensen | 87 | HS | 0.33.61 | 0.32.09 | 510 |

**200 m rygg, menn**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Andrass Thomsen | 82 | HS | 2.25.68 | 2.14.95 | 633 |
| 2 Jóannes á Fløtti | 84 | HS | 2.24.52 | 2.19.58 | 572 |
| 3 Hanus H. Eysturdal | 89 | HS | 2.26.29 | 2.21.80 | 545 |

**100 m rygg, kvinnur**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Sára Ejdesgaard | 87 | TS | 1.14.23 | 1.10.17 | 630 |
| 2 Elspa Mørkøre | 90 | Skeggjar | 1.11.56 | 1.10.93 | 610 |
| 3 Elida Bjarnadóttir | 88 | HS | 1.15.03 | 1.13.60 | 546 |

**200 m blandað, menn**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Jóannes á Fløtti | 84 | HS | 2.29.32 | 2.24.89 | 542 |
| 2 Ottar í Hjøllum | 87 | Flot | 2.42.53 | 2.30.43 | 484 |
| 3 Rúni Klein Hansen | 89 | HS | 2.30.99 | 2.30.64 | 482 |

**50 m bringa, kvinnur**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Karina Petersen | 80 | FS | 0.36.12 | 0.36.27 | 614 |
| 2 Benthe S. Andersen | 82 | TS | 0.37.00 | 0.36.93 | 582 |
| 3 Eyðbj. A. Petersen | 90 | Skeggjar | 0.38.13 | 0.38.02 | 533 |

**100 m frí, menn**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Andrass Thomsen | 82 | HS | 0.56.64 | 0.53.93 | 698 |
| 2 Sonni Eliasen | 79 | FS | 0.57.51 | 0.56.88 | 595 |
| 3 Beinir E. Danielsen | 88 | Flot | 0.57.18 | 0.57.23 | 584 |

**4X100 m frí, kvinnur**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Havnar Svimjifelag 1 | | | 4.28.61 | 4.14.74 | 614 |
| Annika Jacobsen | 86 | | | | |
| Elida Bjarnadóttir | 88 | | | | |
| Rannva Jacobsen | 82 | | | | |
| Lisbeth L. Joensen | 87 | | | | |
| **2 Tvøroyrar Svimjif. 1** | | | 4.28.69 | 4.19.46 | 581 |
| Shalia m. Garðarnar | 84 | | | | |
| Sára Ejdesgaard | 87 | | | | |
| Jutta Thomsen | 90 | | | | |
| Benthe S.Andersen | 82 | | | | |
| **3 Tvøroyrar Svimjif. 2** | | | 4.38.90 | 4.32.24 | 503 |
| Hildibjørg Joensen | 90 | | | | |
| Katrin Sørensen | 82 | | | | |
| Anna K. Eysturberg | 90 | | | | |
| Mona Simonsen | 91 | | | | |

**4x100 m blandað, menn**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Havnar Svimjifelag 1 | | | 4.38.25 | 4.13.88 | 596 |
| Jóannes á Fløtti | 83 | | | | |
| Andrass Thomsen | 82 | | | | |
| Janus Olsen | 86 | | | | |
| Aksal Holm Norðfoss | 87 | | | | |
| **2 Havnar Svimjifelag 4** | | | 4.29.34 | 4.15.71 | 583 |
| Kristian M. Joensen | 79 | | | | |
| Ingi Andreasen | 76 | | | | |
| Ian Skylv Hansen | 73 | | | | |
| Evind Eysturoy | 77 | | | | |
| **3 Havnar Svimjifelag 2** | | | 4.39.99 | 4.35.53 | 466 |
| Hanus Eysturdal | 89 | | | | |
| Egil Gunnarson | 87 | | | | |
| Rúni K. Hansen | 89 | | | | |
| Bogi Jørgensen | 88 | | | | |

**400 m frí, kvinnur**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Lisbeth L. Joensen | 87 | HS | 4.53.77 | 4.46.89 | 614 |
| 2 Elspa Mørkøre | 91 | Skeggjar | 5.00.22 | 4.54.24 | 569 |
| 3 Jutta Thomsen | 90 | TS | 5.16.82 | 4.58.71 | 544 |

**100 m firvald, menn**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Janus T. Olsen | 86 | HS | 1.08.63 | 1.02.12 | 580 |
| 2 Jóannes á Fløtti | 84 | HS | 1.06.89 | 1.03.93 | 532 |
| 3 Ian Skylv Hansen | 73 | HS | 1.07.32 | 1.04.95 | 507 |

**200 m firvald, kvinnur**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Shaila m. Garðarnar | 84 | TS | 2.39.6 | 2.35.96 | 524 |
| 2 Natalia Reinhardt | 89 | Ægir | 2.42.4 | 2.44.14 | 450 |
| 3 Aster Thorsen | 92 | VS | | 3.39.55 | 188 |

**200 m frí, menn**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Andrass Thomsen | 82 | HS | 2.10.65 | 1.56.22 | 744 |
| 2 Jákup Ø. Mohr | 89 | FS | 2.08.90 | 2.04.85 | 600 |
| 3 Sonni Eliasen | 79 | FS | 2.11.89 | 2.06.26 | 580 |

**100 m bringa, kvinnur**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Karina Petersen | 80 | FS | 1.25.48 | 1.20.05 | 573 |
| 2 Benthe S. Andersen | 82 | TS | 1.28.12 | 1.22.38 | 526 |
| 3 Maria Vang | 90 | TS | 1.25.19 | 1.23.83 | 499 |

**50 m rygg, menn**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Andrass Thomsen | 82 | HS | 0.31.99 | 0.29.65 | 599 |
| 2 Janus T. Olsen | 86 | HS | 0.30.47 | 0.29.75 | 593 |
| 3 Jóannes á Fløtti | 84 | HS | 0.31.41 | 0.30.67 | 541 |

**200 m rygg, kvinnur**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Sára Ejdesgaard | 87 | TS | 2.46.47 | 2.34.59 | 549 |
| 2 Katrin Sørensen | 82 | TS | 2.41.14 | 2.44.11 | 459 |
| 3 Hildibjørg Joensen | 90 | TS | 2.51.82 | 2.44.70 | 454 |

**100 m blandað, menn**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Andrass Thomsen | 82 | HS | 1.09.03 | 1.03.30 | 684 |
| 2 Jóannes á Fløtti | 84 | HS | 1.07.31 | 1.05.62 | 614 |
| 3 Beinir E. Danielsen | 88 | Flot | 1.06.74 | 1.06.71 | 584 |

**400 m blandað, kvinnur**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Elspa Mørkøre | 90 | Skeggjar | 5.30.20 | 5.32.02 | 559 |
| 2 Katrin Sørensen | 82 | TS | 5.40.8 | 5.41.37 | 514 |

**100 m bringa, menn**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Per S. Hansen | 88 | Flot | 1.12.55 | 1.09.63 | 651 |
| 2 Kristian S. Nielsen | 88 | TS | 1.14.06 | 1.12.54 | 576 |
| 3 Erling Jacobsen | 90 | Skeggjar | 1.19.69 | 1.19.13 | 443 |

**50 m frí, kvinnur**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Shaila m. Garðarnar | 42 | TS | 0.28.17 | 0.28.06 | 636 |
| 2 Lisbeth L. Joensen | 87 | HS | 0.28.87 | 0.29.00 | 576 |
| 3 Rannvá Jacobsen | 82 | HS | 0.29.88 | 0.29.84 | 529 |

**4X100 m frí, menn**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **1 Havnar Svimjifelag 2** | | | 4.01.46 | 3.47.43 | 617 |
| Bogi Jørgensen | | | | | |
| Janus Olsen | | | | | |
| Jóannes á Fløtti | | | | | |
| Aksal H. Norðfoss | | | | | |
| **2 Havnar Svimjifelag 4** | | | 4.06.21 | 3.51.83 | 583 |
| Eivind Eysturoy | | | | | |
| Ian Skylv Hansen | | | | | |
| Ingi Andreasen | | | | | |
| Kristian Martin Joensen | | | | | |
| **3 Havnar Svimjifelag 1** | | | 4.06.37 | 3.53.48 | 570 |
| Egil Gunnarson | | | | | |
| Búi Rouch | | | | | |
| Hanus H. Eysturdal | | | | | |
| Andras Thomsen | | | | | |

**4X100 m blandað, kvinnur**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **1 Tvøroyrar Svimjifelag 1** | | | 5.05.48 | 4.51.31 | 547 |
| Sára Ejdesgaard | | | | | |
| Benthe S. Andersen | | | | | |
| Shalia m. Garðarnar | | | | | |
| Jutta Thomsen | | | | | |
| **2 Havnar Svimjifelag 1** | | | 5.12.69 | 5.04.53 | 479 |
| Halla W. Reinert | | | | | |
| Lisbeth L. Joensen | | | | | |
| Bjørg Seloy | | | | | |
| Rannvá Jacobsen | | | | | |
| **3 Tvøroyrar Svimjifelag 2** | | | 5.22.52 | 5.04.99 | 477 |
| Hildibjørg Joensen | | | | | |
| Maria Vang | | | | | |
| Katrin Sørensen | | | | | |
| Mona Simonsen | | | | | |

**50 m bringa, menn**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Per S. Hansen | 88 | Flot | 0.32.63 | 0.32.59 | 608 |
| 2 Louis Poulsen | 80 | Ægir | 0.32.93 | 0.32.78 | 597 |
| 3 Beinir E. Danielsen | 88 | Flot | 0.33.50 | 0.34.61 | 507 |

**100 m blandað, kvinnur**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Lisbeth L. Joensen | 87 | HS | 1.14.97 | 1.12.55 | 655 |
| 2 Elspa Mørkøre | 90 | Skeggjar | 1.13.38 | 1.13.64 | 627 |
| 3 Benthe S. Andersen | 82 | TS | 1.14.63 | 1.14.34 | 609 |

**400 m blandað, menn**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Jóannes á Fløtti | 84 | HS | 5.03.80 | 5.00.90 | 585 |
| 2 Pól Joensen | 90 | VS | 5.55.75 | 5.44.23 | 391 |

**100 m firvald, kvinnur**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Shaila m. Garðarnar | 84 | TS | 1.09.09 | 1.09.86 | 532 |
| 2 Natalia Reinhardt | 89 | Ægir | 1.12.50 | 1.11.70 | 492 |
| 3 Barbara á Líðarenda | 90 | Skegjar | 1.23.74 | 1.20.13 | 352 |

**400 m frí, menn**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Andrass Thomsen | 82 | HS | 4.33.80 | 4.13.47 | 659 |
| 2 Jákup Ø. Mohr | 89 | FS | 4.48.27 | 4.23.05 | 589 |
| 3 Kristian S. Nielsen | 88 | TS | 4.42.08 | 4.30.87 | 540 |

**200 m frí, kvinnur**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Lisbeth L. Joensen | 87 | HS | 2.21.29 | 2.15.80 | 635 |
| 2 Rannvá Jacobsen | 82 | HS | 2.18.31 | 2.17.56 | 611 |
| 3 Annika Jacobsen | 86 | HS | 2.21.58 | 2.18.06 | 605 |

**100 m rygg, menn**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Andrass Thomsen | 82 | HS | 1.08.53 | 1.01.62 | 658 |
| 2 Janus T. Olsen | 86 | HS | 1.07.17 | 1.03.29 | 607 |
| 3 Jóannes á Fløtti | 84 | HS | 1.08.09 | 1.04.45 | 575 |

**50 m rygg, kvinnur**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Elspa Mørkøre | 90 | Skeggjar | 0.33.71 | 0.33.23 | 614 |
| 2 Elida Bjarnadóttir | 88 | HS | 0.34.54 | 0.33.27 | 612 |
| 3 Sára Ejdesgaard | 87 | TS | 0.34.52 | 0.33.51 | 599 |

**200 m firvald, menn**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Jóannes á Fløtti | 84 | HS | 2.28.5 | 2.28.14 | 470 |
| 2 Rúni Klein Hansen | 89 | HS | 2.38.8 | 2.34.91 | 411 |
| 3 Arnholdt Davidsen | 91 | Flot | | 3.21.49 | 186 |

**200 m bringa, kvinnur**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Karina Petersen | 80 | FS | 3.00.38 | 2.55.46 | 548 |
| 2 Maria Vang | 90 | TS | 3.01.50 | 2.58.75 | 518 |
| 3 Malan Bærendsen | 91 | TS | 3.05.42 | 3.02.32 | 489 |

**50 m frí, menn**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Andrass Thomsen | 82 | HS | 0.25.80 | 0.25.26 | 629 |
| 2 Eivind Eysturoy | 77 | HS | 0.25.87 | 0.25.58 | 605 |
| 3 Aksal H. Norðfoss | 87 | HS | 0.25.89 | 0.25.74 | 594 |

**4X50 m frí, kvinnur**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **1 Tvøroyrar Svimjifelag 1** | | | 1.57.82 | 1.56.35 | 806 |
| Shalia millum Garðarnar | | | | | |
| Sára Ejdesgaard | | | | | |
| Hildibjørg Joensen | | | | | |
| Benthe S.Andersen | | | | | |
| **2 Havnar Svimjifelag 1** | | | 2.04.99 | 1.56.98 | 793 |
| Lisbeth L.Joensen | | | | | |
| Elida Bjarnadóttir | | | | | |
| Annika Jacobsen | | | | | |
| Rannvá Jacobsen | | | | | |
| **3 Skeggjar** | | | 2.02.84 | 2.01.34 | 711 |
| Kirstin S.Rasmussen | 90 | | | | |
| Barbara á Líðarenda | 90 | | | | |
| Elspa Mørkøre | 91 | | | | |
| Heidi Strømsten | 90 | | | | |

**4X50 m frí, menn**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **1 Havnar Svimjifelag 1** | | | 1.49.91 | 1.42.78 | 836 |
| Andrass Thomsen | | | | | |
| Hanus Eysturdal | | | | | |
| Jóannes á Fløtti | | | | | |
| Aksal H. Norðfoss | | | | | |
| **2 Havnar Svimjifelag 4** | | | 1.46.58 | 1.44.76 | 789 |
| Kristian Martin Joensen | | | | | |
| Eivind Eysturoy | | | | | |
| Ian Skylv Hansen | | | | | |
| Ingi Andreasen | | | | | |
| **3 Havnar Svimjifelag 2** | | | 1.46.49 | 1.46.20 | 758 |
| Búi Rouch | 88 | | | | |
| Janus T. Olsen | 86 | | | | |
| Egil Gunnarsson | 87 | | | | |
| Bogi Jørgensen | 88 | | | | |